# Jesus er endamálið

**Fólk streymaðu í Kelduna í Skálafirði leygarkvøldið til ungdómstiltakið, Awake. Gjøgnum Rás2, sum sendi beinleiðis, varð neyðugt hjá fyrireikarunum at heita á fólk um ikki at koma fleiri, tí nú var talið á fólki farið upp um tey túsund, sum av trygdarorsøkum er tað mest loyvda**

UNGDÓMSTILTAK
*Myndir: Jens K. Vang*
*Orð: Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tey ungu, sum fingu høvi at vera við til stóra ungdómstiltakið í Kelduni leygarkvøldið, vóru avgjørt ikki vónsvikin.

Hetta var júst nakað fyri tey ungu. Tónleikurin var av tí besta og ljóð, ljós og litir settu veruliga sín dám á kvøldið.

Húsið er útgjørt við øllum tí, sum krevst til eina nútímans konsert, og møguleikarnir at framføra eru teir bestu í landinum.

Arni Abrahamsen, ungdómsleiðari sigur, at tey gjørdu av at gera eitt tiltak fyri tey ungu, har tey samstundis fingu roynt ljóð- og ljósútgerðina rættiliga.

Tað vóru fyrst og fremst ung, sum hoyra til Kelduna, ið sungu og framførdu. Tó hevði Eyðun Jacobsen savnað nakrar tónleikarar úr fleiri øðrum samkomum í ein bólk, sum hann nevnir, Eyðun Jacobsen Band.

Samanumtikið kunnu vit siga, at hetta var eitt serstakliga væleydnað tiltak, sum rættiliga fangaði tey ungu.

– Okkara høvuðsendamál er sjálvsagt at lyfta Jesu navn høgt, og tað gleðiligasta av øllum er, at hetta fyrsta vikuskiftið í nýggja húsinum komu fleiri til umvending, sigur Arni Abrahamsen.

Ungdómsmøtið er í Kelduni hvørt leygarkvøld klokkan 21.00, og í vetur er ætlanin at skipa fyri fleiri størri tiltøkum. Eitt nú kemur kristni rockbólkurin, Narnia úr Svøríki, á vitjan einaferð í heyst.



Arni Abrahamsen, ungdómsleiðari, syngur sjálvur við bólkinum, Direct Level. – Høvuðsendamálið við øllum er sjálvsagt at lyfta Jesu navn høgt, sigur hann



*Tað fór eitt suð gjøgnum salin, tá Sigmund Petersen, løgreglumaður, kom koyrandi á motorsúklu sínari inn eftir gólvinum. Men Sigmund kom ikki í tænastuørindum, men vildi á henda sjáldsama hátt siga teimum ungu um Jesus*






*Hetta var júst nakað fyri tey ungu. Tónleikurin var av tí besta og ljóð, ljós og litir settu veruliga sín dám á kvøldið*



# Væleydnað kommunalt kemi veksur

**Stevið vísir seg at vera gott millum tær 14 bygdirnar sum frá og við 2005 mynda Runavíkar Kommunu; longu nú er teirra 103 milliónir krónur fíggjarætlan fyri komand ár klár og samtykt**

RUNAVÍK
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Rodmundur Nielsen borgarstjóri sær Runavíkar Kommunu sum eina samansetta eind við einari sterkari felags visión um samstarv og framstig*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hetta er tann ársins tíðin hvar tær størru føroysku kommunur vanliga kjaka seg heitar um komandi fíggjarætlan; tann ofta drúgva telvingin fyri at fáa allar bitar upp á pláss kann vera so møðsom at hon slúkar ein stóran part av orkuni hjá teimum kommunalu politikarunum.

Men rokna ikki Runavík við her. Ikki ti, Runavíkar Kommuna er triðstørsta kommuna í landinum og telur frá og við 2005 góðar 3600 íbúgvar. Kommunan, sum strekkir yvir alsamt størri partar av ikki bara Skálafjørðinum men allari Eysturoynni, umfatar frá og við 2005 so mikið sum 14 bygdir: Æðuvík, Rituvík, Runavík, Saltangará, Glyvrar, Lambareiði, Lambi, Søldarfjørður, Skipanes, Skáli, Skálabotnur, Funningsfjørður, Oyndarfjørður, Elduvík.

Tær fimm siðstnevndu bygdirnar koma við í Runavíkar Kommunu frá og við komandi ári, og útgera eitt geografiskt gleiv norðureeftir, beint inn í tað sum traditionelt hevur verið roknað sum ‘fuglfirðiskt territorium’. Fyri mong ein markering av at tíðirnar eru broyttar og at framvøksturin av Runavíkar Kommunu umboðar hesa broyting.

Borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen, hevur úr at gera við at vitja tær nógvu bygdirnar. Og okkurt bendir á at hann, við fullari uppbakking frá flestu kommunal politikarum í kommununi, er haldari av einari hálvgun idealistiskari uppfatan av smáplássum og bygdamenning. Ein uppfatan sum kanska hóskar til tað útspjadda lyndið í samansetingini av Runavíkar Kommunu.

»Tú merkir ikki tað stóra til spenningar millum bygdirnar her í kommununi,« segði borgarstjórin undir einum interviewi. »Eg haldi meg merkja ein ógvuliga góðan vilja til at finna loysnir, ein góðan kemi um tú vilt… Nú innan uppstillingarnar til komandi kommunuval lá tað eisini í kortunum hjá øllum at koma fram til konsensus um týðandi mál í góðari tíð.«

*Hvat er tað sum motiverar slíka breiðu semju?*

»Tað kann liggja okkurt í tí andanum av framdrift og nýhugsan sum fólk sambinda við Runavík… Tað kann vera ringt at seta fingurin á akkurát hvat tað er sum ger at stevið er so mikið gott. Men eg havi varhugan av at allar hesar bygdir sum vilja vera við her hava eina uppfatan um framstig og menning í nærumhvørvinum sum onkursvegna samljóðar. «

Millum ítøkiligar faktorar sum kunnu hugsast at viðvirka til tað góða stevið á Skálafjørðinum telist tann sannroynd at smáar bygdir sum Rituvík og Æðuvík vísa seg at klára seg væl.

»Flest allir kommunalir politikarar her haldi eg duga at síggja allar partarnar í kommununi, eisini teir smáu partarnar. Tað er hóast alt ikki so torført hjá einari stórari kommunu at seta upp gøtuljós og leggja vatnveitingar við meira, eisini úti á teimum smærri plássunum. Æðuvík varð herfyri vald til ‘Ársins Best Røktu Bygd’ og Rituvík var nummar trý …«

Fíggjarætlanin hjá Runavíkar Kommunu fyri 2005 sum longu er samtykt, eisini av teimum kommunum sum nú verða avvikladar til frama fyri ta hægru eindina, javnvigar við 103 milliónir krónur. Tyngsti postur á fíggjarætlanini er barnaansing sum kostar knappar 18 milliónir.

Íløgurnar sum pláss er til undir komandi fíggjarári fevna um góðar 18 milliónir, har ímillum fýra milliónir til skúlabygging, smáar tríggjar milliónir til útstykkingar, góð hálvonnur millión til regulering av havnaøki, onnur hálvonnur millión til reinsiverk, lítil hálvonnur millión til kloakk, ein góð millión til stadion og ein onnur góð millión til vegir.

## Stjørnur í Suðuroy

Leygarkvøldið kunnu suðuroyingar og onnur fara til DJ- og Karaokeshow í TB-húsinum á Tvøroyri.

DJ-SHOW er eitt sokallað mobildiskotek, sum ferðast kring landið við tónleikinum. Hetta tiltakið byrjar á miðnátt leygarkvøldið tann 11. september. Møguleilki verður eisini at syngja karaoke og verða stjørna í eitt kvøld. Sagt verður, at fleiri nýggj løg eru innkomin.

## Amnesty harmast

– Amnesty hevur djúpastu samkenslu við teimum avvarandi hjá øllum teimum sum doyðu og við teimum, sum yvirlivdu syrgiligu gíslatøkuna í Beslan.

Tað sigur Amnesty International í yvirlýsing, sum vísir á, at onki kann rættvísgera eina gíðslatøku.

Fleiri enn 322 fólk doyðu í Beslan, harav minst 150 børn.

## DJ í Havn

Nú verður aftur lív í Badmintonhøllini í Havn. Leygarkvøldið tann 11. september frá klokkan 23:30 verður DJ-SHOW og DJ-switch á skránni við Pæturi Magnussen. Atgongumerki kosta kr. 120.

Fyrireikararnir hava skipað fyri busskoyring til Badmin-tonhøllina. Til ber at ringja á telefon 217752, sum er Vestmannaleiðin. Ringjast kann eisini til Eysturoyaleiðin á telefon 216464.

**-hkm**

# Laksakvotur - eitt neyðugt val millum pest og kolera

**Havbúnaðarfelagið hevur heitt á løgmann um at gera enn eina roynd at fáa donsku stjórnina at broyta støðu viðvíkjandi »safeguard« málinum. Tí um ikki ein kvotuloysn verður sett í verk, so hava vit beinanvegin eitt nýtt dumping mál, sigur Havbúnaðarfelagið**

LAKSAKVOTUR
*Tíðindaskriv*

ES nevndin kom í august til niðurstøðu í safeguard málinum, og fyribils kvotur vóru settar á innflutning av laksi úr Noreg og Føroyum. Danmark tekur ikki undir við hesari loysn og umhugsar at kæra málið.

Samstundis eru greið boð komin frá skotsku alarunum um, at nýggj dumping ákæra verður reist beinan vegin, um »safeguard« tilgongdin verður steðga.

Føroya Havbúnaðarfelag hevur tí í dag heitt á løgmann um at gera enn eina roynd at fáa donsku stjórnina at skilja føroysku støðuna og okkara áhugamál.

Føroyska vinnan hevur altíð gingið inn fyri fríðum handli, og tað ger Havbúnaðarfelagið eisini. Men í hesum málið kunnu vit bert velja millum pest og kolera.

Lágir laksaprísir hava gjørt at alivinnan sum heild er í kreppu. Alivinnan í Skotlandi og Írlandi er hart kroyst, eins og hjá okkum. Í Noreg heldur framleiðslan hinvegin fram, sjálvt um nógv virkir áttu at verða steðga upp av fíggjarligum ávum. Skotar og írar brúka teir handilspolitisku møguleikar sum eru við at liggja innanfyri ES samveldi. Teir hava áður roynt dumping mál, og vár var so eitt sokallað safeguard mál reist. Avleiðingarnar av safeguard kanningini vóru væntandi, at ein kvotaskipan var sett í verk fyri at avmarka framleiðsluna og gera prísin meira støðugan.

Havbúnaðarfelagið hevur í hesum sambandi góðtikið eina kvotaskipan. Ikki tí at vit ikki ganga inn fyri fríhandli, men tí at vit noyðast at fyrihalda okkum til veruleikan. Ein kvotaskipan kundi merkt eina nýggja byrjan fyri alivinnuna, tí prísirnir vildu fari upp. Um ikki ein kvotaskipan fæst at virka, so reisir alivinnan í Skolandi og Írlandi eitt nýtt dumpingmál. Og hesa ferðina hava teir góð kort, tí støði verður tikið í søluni í 2003. Eitthvørt felag sum seldi laks til ES í 2003 kann tekniskt ákærast fyri dumping, tí prísirnir vóru í botni. Eitt nýtt dumpingmál kann tí enda við at høgur tollur verður lagdur á laks til ES marknaðin í millum 4 og 8 ár. Hetta vildi merkt at eingin laksaaling verður í Føroyum.